# Havhestaungarnir vóru léttari í ár

**Summarið royndist illa hjá sjófuglinum, og eitt úrslit av hesum er, at miðalvektin á pisunum var væl lægri, enn hon vanliga er**

HAVHESTAUNGAR
*Bergur Olsen, Náttúrugripasavnið*

Summarið royndist sera illa hjá sjófuglinum. So gott sum ongar ritupisur og ternupisur komu undan, og lítið kom undan av lundapisum. Havhesturin, ið higartil hevur klárað seg væl, hevði eisini trupuleikar. Í Høvdanum í Skúvoy vóru 15% færri ungar. Í Nólsoy vóru eisini færri ungar, og teir, sum vóru tiknir í berginum, vóru sera vánaligir. Teir flestu havhestaungarnir, verða tó tiknir á sjónum, og teir eru so feitir, at teir ikki fáa flogið, og kunnu tí takast frá báti við glúpi. Roknast kann tí ikki við, at stórur munur er á vektini tey ymsu árini á hesum havhestaungunum, sum ikki fáa flogið. Kortini vóru havhestaungarnir í ár 7% léttari enn fyri 16 árum síðani.




*Ljósu stabbarnir sýna títtleikan av bøgum við ávísu vektini. Myrku stabbarnir sýna tilsvarandi títtleikan av steðgjum*

## Seinir á sjógv

Av tí at færri havhestaungar eru komnir undan, var tí eisini hugsandi, at havhestaveiðan fór at vera verri í ár enn vanligt, men tað var ikki tann heilt stóri munurin. Havhestaungarnir komu eitt sindur seinni á sjógvin enn vanligt, og teir vóru kanska eitt sindur ótættari á sjónum, men teir flestu bátarnir fingu helst nóg mikið. Ongi hagtøl eru fyri havhestaveiðu, so tað eru bert leysligar metingar.



*Lítla føðin hjá sjófuglinum hevði við sær, at havhestaungarnir vóru væl léttari í ár, enn teir vanliga eru*

## Léttari

Nógvir av havhestaungunum, ið komu undan í ár, vóru helst léttari enn vanligt, ja, so léttir, at teir kundu flúgva beinan vegin teir fóru úr reiðrinum. Teir léttastu havhestaungarnir komu tí ikki við ímillum teir, sum vórðu tiknir á sjónum og ikki fingu flogið fyri fita. Í 1988 og 1989 vigaði eg havhestaungar, sum vit tóku ímillum Barðið og Myling, og tað samað varð eisini gjørt í ár. Miðalvektin á bøgunum í ár var 750g og á steggjunum 897g. Samanborið við 1988 og 1989 vóru havhestaungarnir 7% léttari í ár.

## Steggjarnir nógv størri enn bøgurnar

Steggjarnir eru nógv størri enn bøgurnar, og tí er neyðugt at samanbera kynini ímóti hvørjum øðrum fyri at fáa álítandi úrslit. Tær minstu bøgurnar eru minni enn helvtin av einum stórum steggja (sí mynd). Kynið sæst bert við at hyggja eftir, um fuglurin hevur eistur, ella um hann hevur eggjaleiðara. Hetta er torført at síggja á ungum fugli, har eistrini bert eru o.u. 2 mm lang. Um ikki verður hugt eftir kyninum, er munurin ímillum 1988/89 og 2005 bert 4 %, men tað er tí, at vit fingu fleiri steggjar í ár enn í 1988 og 89 (ávikavist 46% og 59%).

## Nógvar óvissur

Tað er torført at samanbera vektina á havhestaungum, sum eru tiknir á sjónum, tí tað eru so nógvar skiftandi umstøður, ið kunnu hava ávirkan á vektina á fuglunum, sum ein fær fatur á. Vindurin hevur helst mest at siga, tí um nógvur vindur er og óslætt, sleppa ungarnir léttari á flog undan bátinum, og tí kann hugsast, at bara teir tyngstu verða tiknir, tá ið vindur er. Ferðin á bátinum hevur eisini týdning, so at teir skjóttgangandi bátarnir fáa fatur á onkrum léttum ungum, sum høvdu sloppið undan, um báturin gekk seinri. Havhestaungarnir vórðu tiknir ímillum Barðið og Myling øll árini, men vindurin var meira í ár, so tí hevði munurin helst verið størri enn tey 7 %-ini, um tað var minni vindur.

Tvær fyri ein prís




Fyrsta dagin kemur tann seinna bókin

Við úthavsins strendur

í bókabúðirnar. Í henni verður sagt frá vanlukkum á sjónum frá 1975 til í dag. Áhugin fyri bókini er stórur, men fleiri spyrja eisini eftir teirri fyrru, sum er um vanlukkur árini frá 1950 til 1975.
Vit hava nøkur fá eintøk av henni eftir, og enn ber til at ogna sær

báðar fyri 398 krónur

beinleiðis frá forlagnum við at flyta peningin á konto okkara 9865 1028949 í Norðoya Sparikassa. Bøkurnar verða sendar við postinum, so tað er umráðandi, at navn og bústaður fylgja við gjaldinum.

Gevið gætur, at tilboðið er galdandi, so leingi tann fyrra bókin er á goymslu!

FORLAGIÐ GRÁFELLI
Telefon 0045 2279 4617
grafelli@email.fo

Ferðslutrygd:

# Børnini í miðdepilin mikudagin

**Ferðslutrygd setur børnini í miðdepilin mikudagin 23. november. Vit hava bjóðað øllum teimum, ið dagliga hava við trygdina hjá børnum í bilum at gera, til kunning um hetta evnið**

TÍÐINDASKRIV

Endamálið er at arbeiða ímóti einum felags støði og vitanargrundarlagi, soleiðis at øll fakfólk geva samsvarandi upplýsingar til brúkaran. Hetta økir trúvirðið og menningin hugburðin fyri trygd sum heild.

Enn er ikki komið á mál, tí alt ov nógv fólk gloyma at binda síni børn, serliga á teimum stuttu koyritúrunum. Tað kann ikki sigast nóg ofttani, hvussu stóran týdning trygdarbeltið hevur, um ein skal sleppa so snikkaleysur sum gjørlig frá eini ferðsluvanlukku. Av tí at børn er so bleyt, kunnu tey koma serliga illani fyri, um tey ikki sita íbundin.